# Hetta er mín jólasangur



*- Eg haldi, at sálmurin "Eg gleðist so hvørt jólakvøld" sigur alt um hendingina, jólanátt og okkara samband við hann, sigur Albert Ellefsen úr Miðvági*

**Albert Ellefsen:**

## Eg gleðist so hvørt jólakvøld

- Tá ið eg nú skuldi velja ein sálm, var tað hesin sum rann mær fyrst í hug. Sálmurin er inniligur og sigandi, sigur Albert Ellefsen úr Miðvági.

Sum smádrongur var eg rættiliga ósmæðin, fírdi ikki fyri at sita millum sangkempurnar í Miðvágs kirkju og syngja, syngja hart. Tá ið ein gekk í skúla og hevði morgunsang hvønn morgun, tá lærdi ein nógvar sálmar uttanat. Minnist tíðina tá sum sera gevandi, hóast ein ikki gongur líka nógv í kirkju í dag, sum tá, hava sálmarnir, teir flestu brent seg inn í nethinnuna.

Eg haldi at sálmurin eg havi valt, sigur alt um hendingina, jólanátt og okkara samband við hann. Tað sum eg leggi størstan týdning í, er at tað eri eg, barnið og móðurin, sum á ein ella annan hátt samskifta um tað sum hendir.

Sálmurin byrjar við at siga frá um hendingina jólanátt og hvar hann nú er. Síðani fortelur móðurin og leggur niður barnið. Ein tann mest spennandi løtan var, tá ið ljósini vóru tendraði á jólatrænum, jólaaftan. Barnið frøist síðani um teir møguleikar tað nú hevur, tá ið Jesus var føddur og tann tryggleika, at tað er lív eftir deyða.

- Einki er sum barnajól, sigur Albert Ellefsen.

## Eg gleðist so hvørt jólakvøld

*Eg gleðist so hvørt jólakvøld,*
*tí Jesus føddist tá,*
*tá lýsti stjørnan sum ein sól,*
*lag sungu einglar tá.*

*2. Og litla barn í Betlehem,*
*tað var ein kongur bold',*
*sum kom av høgu himnaborg*
*á hesa neyðar fold.*

*3. Nú hann í himmiríki býr,*
*tí hann Guðs sonur er;*
*men altíð hoyrir hann hvønn tann,*
*í bøn til hansar fer.*

*4. Eg gleðist so hvørt jólakvøld,*
*vit syngja honum prís,*
*tá øllum smáum opnar hann*
*sítt sæla paradís.*

*5. Og móðir tendrar tá øll ljós,*
*tey skína í hvønn krók,*
*tí út um heimin, sigur hon,*
*at lýsa stjørnan tók.*

*6. Hon sigur, stjørnan lýsir enn*
*og aldri slokna kann,*
*og um hon lýsti mær á veg,*
*tá heim til Guðs eg fann.*

*7. Hon sigur, at hitt einglaljóð*
*tað ljóðar enn í dag*
*um frið og gleði her á jørð*
*og um Guðs hjartalag.*

*8. O, gævi eg kundi sungið so,*
*tá gleddist Jesu lund;*
*tí eg við varð Guðs kæra barn*
*á halgu skírnarstund.*

*9. Eg gleði meg hvørt jólakvøld*
*um Harran Jesus Krist.*
*At hann av sonnum elskar meg,*
*tað veit eg fult og vist.*

Marie Wexelsen 1860/J. Dahl 1931.

# 600 mió køkur á jólum



*Smákøkur eru partur av hugnanum um jólini. Hvør dani etur í miðal 110 slíkar*

Danir eru óførir at eta piparnøtur, brúnakøku og kleynur á jólum.

- 110 køkur fyri hvønn dana.

Hesa metingina er ein tann størsti køkuframleiðarin í Danmark, Bisca komin fram til.

Sjálv sendi fyritøkan 450.000.000 piparnøtur, brúnakøkur og kleynur út í donsku handlarnar fyri tveimum árum síðani, vísa hagtølini.

Allar bileggingarnar gera sítt til, at nógv virksemi er á verksmiðjuni í november mánaði, tá flestu køkurnar verða bakaðar.

Sølan av køkum, ið ikki beinleiðis hava við jólini at gera, minkar eitt sindur í jólatíðini, men ikki eins nógv og sølan av jólakøkum økist.

– Yvirhøvur síggja vit ein vøkstur í søluni í jólamánaðunum, hevur stjórin í Bisca, Leif Bergvall Hansen áður sagt við danskar miðlar.

### Forkela

Sølan av køkum er bert eitt av fleiri dømum um, at danir dáma væl at eta søtt í jólatíðini. Og hetta kann sjálvandi ávirka fólkaheilsuna.

Men Leif Bergvall heldur kortini ikki, at tað er neyðugt at fáa ringa samvitsku, um ein dámar hetta ov væl.

– Um ein grundleggjandi fær ein fjølbroyttan og sunnan kost, kann ein saktans eta nakrar køkur.

– Eg haldi, at tað beinleiðis kann vera positivt, um vit forkela hvønn annan av og á. Serliga, um hetta er við til at tryggja samveru og hugna í familjuni, sigur Bisco-stjórin.

